## Obama: Eingin rasisma



Fyrrverandi amerikanski forsetin Jimmy Carter segði nú um dagarnar, at uppskotið um eina nýskipan á amerikanska heilsuøkinum fær so stóra mótstøðu millum amerikanararnar, tí at forsetin er svartur. Men talsmaðurin hjá Barack Obama, Robert Gibbs, sigur við fjølmiðlarnar, at sambært forsetanum hevur mótstøðan einki við hansara húðalit at gera. Carter vísti eisini á, at ein republikanskur kongresslimur kallaði forsetan lygnara, og at tað eisini hevði við húðalit forsetans at gera. Men tað hava republikanararnir avsannað fleiri ferðir.

## Enn ein Fritzl

Løgreglan í avstralska statinum Victoria hevur tikið ein mann og skuldsett hann fyri at hava neyðtikið dóttur sína javnan ígjøgnum 30 ár. Kvinnan hevur átt fýra børn, og løgreglan sigur, at pápi hennara er pápi børnini. Øll fýra vóru fødd við breki, og eitt teirra doyði. Avstralska løgreglan sigur við blaðið The Herald Sun, at neyðtøkurnar byrjaðu, tá gentan var 13 ára gomul, og at pápin hótti hana við at buka hana, um hon fór til løgregluna. Men í februar fór kvinnan til løgregluna og meldaði pápan. Síðani hava DNA-kanningar prógvað, at hann er pápi børnini. Ræpttarmálið ímóti honum byrjar í november. Sambært The Herald Sun visti mamman einki.



*Dorete Bloch skal nú kanna tær tríggjar Risso's Dolphins, sum løgdu beinini í Klaksvík í gjár*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Sjáldsamar delfinir lagt beinini

**Klaksvíkingar stríddust í drúgva tíð at fáa rakstur á ein bólk, teir upprunaliga hildu var grind, men sum síðani varð hildið at vera hvessingar. At enda fingu teir hildið tríggjar av tí sum síðani skuldi vísa seg at vera Risso's Dolphin til**

ROSSI'S DOLPHIN

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Um hálvgum seks tíðina í gjárkvøldið varð boðað frá grind í Klaksvík. Grindin varð funnin út fyri Borðoyavík og varð mett um 300 hval.

Seinni vísti tað seg, at talan ikki var um grind, men heldur um hvessing. Sera trupult var at fáa rakstur á, og skjótt gekk hon í fleiri bólkum.

Eisini uppførdu hesar delfinirnar seg sera undarligt, lupu sjóleysar upp úr sjónum, og kavaðu at síggja til ógvuliga djúpt og leingi.

Tað eydnaðist klaksvíkingum at enda at halda fýra delfinum til, men tann eina slapp. Tá menn kannaðu delfinirnar nærri var týpiligt, at talan heldur ikki var um hvessing, men okkurt heilt annað slag, sum ikki stóð positivt á listanum yvir hvalir og delfinir, sum loyvt er at veiða.

Sýslumaðurin í Norðoyggjum, Hans Djurhuus, gav tí beinanvegin boð um at gevast við rakstrinum, og lata delfinirnar fara.

Arvid Nielsen sigur av politistøðini í Klaksvík, at hesar delfinirnar minna nógv um dresseraðu delfinunum í djóragørðum og annars teimum, ein kann síggja fylgja við skipum og bátum í heitari sjógvi.

- Talan er um delfinir, sum eru størri enn springari, men minni enn hvalur, sigur Arvid Nielsen.

### Skulu kannast

Við at kanna delfinirnar nærri og ráðføra seg við Google varð komið fram til, at talan helst er um Risso's Dolphin. Boðað var frá til Náttúrugripasavnið, og tær tríggjar delfinirnar vórðu fluttar suður til goymsluhølið hjá savninum inni í Kaldbak.

Har kundi Dorete Bloch staðfesta, at talan var um Risso's Dolphin, sum ikki er hildin til í Føroyum áður.

- Tað frættist um at Risso's Dolphin er sædd við Orkney og Hetland fyrr í summar, og Náttúrugripasavnið hevur eisini fingið eina fráboðan frá einum báti, sum hevði sæð tær í føroyskum sjóøki seinni í summar. Men hetta er so fyrstu ferð, at Risso's Dolphin er hildin til í Føroyum, sigur Dorete Bloch.

Hetta er samstundis fyrstu ferð, sum Náttúrgripasavnið veit um, at Risso's Dolphin er sædd so norðaliga sum við Føroyar.

- Tær líkjast øðrum delfinum í heitari sjóøki, og leypa sjóleysar upp úr sjónum. Eisini kunnu tær kava ógvuliga djúpt, og kunnu verða undir í upp til hálvan tíma, sigur Dorete Bloch.

Tað er væl kent, at djór kunnu vilast úr sínum vanliga umhvørvi, og Risso's Dolphin er sum áður nevnt sæð við Orkney og Hetland, men eisini hava tey sæð hetta slagið í Miðalhavinum.

### Uppisjóvar delfin

Vanliga heldur Risso's Dolphin til í heitari sjógvi so sum Indiska havinum og Persiska Golfinum.

- Tær halda vanliga til úti á havinum, og eru sjáldan at síggja inni við strendurnar, sigur Dorete Bloch.

Hon dugur ikki at siga hví ein so stórur bólkur hevur vilt seg hendan vegin, men avvísir ikki, at tað kann hava nakað við globalu upphitingina, sum so nógv veðrur tosað um, at gera.

- Vit hava havt eitt óvanliga heitt summar, og tað hevur ávirkað hitan í sjónum. Og tá talan samstundis er um eina globala upphiting, kann tað hava havt eina ávirkan á, at hesin bólkurin er komin hendanvegin, sigur Dorete Bloch.

Tær tríggjar delfinirnar, sum løgdu beinini í Klaksvík í gjár, skulu nú kannast nærri. Men nakað vita tey kortini um hendan hvalin.

- Vit vita, at tær bert hava tenn í undirmunninum, eins og døglingur. Tó hava bæði hannar og honir tenn í mun til døglingin, har bert hannar hava tenn. Vit hava einki føroyskt orð fyri hetta slagið, og eg dugi heldur ikki at síggja nakra meining í at finna eitt orð til hesa delfinina. Hon var uppdagað av einum manni, sum nevndist Risso, og hevur navnið Risso's Dolphin um allan heim, sigur Dorete Bloch.

Hetta slagið kann gerast upp til fýra metrar langt og livir av høgguslokki. Størsta av teimum trimum Risso's Dolphins, sum løgdu beinini í gjár í Klaksvík, er ein hannur, 3,23 metrar langur. Tilsamans er talan um tveir hannar og eina hon.